

*- Eg rokni við at vera á beinkinum, og tá ið eg eri komin heim, vóni eg, at fáa nakrar minuttir á vøllinum, segði Ingi Højsted, men tað tykist nú greitt, at hann verður millum teir fyrstu ellivu týsdagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ingi verður á miðvøllinum í kvøld

**Leikbannaðu spælararnir vera ikki millum teir fyrstu ellivu í kvøld, og ein av málskjúttunum í 3–2 sigrinum á Kasakstan varð sunnukvøldið millum teirra, sum vórðu sendir til hús**

KASAKSTAN
*Jóannes Hansen*

Tá ið seinni dysturin ímóti Kasakstan verður á Tórsvølli í kvøld, verður arbeitt víðari frá dystinum sunnudagin í royndini at finna manningina, sum skal spæla EM undankappingadyst í Reykjavík hvítusunnuaftan.

Síðani tepra tapið á útivølli ímóti Týsklandi hevur verið greitt, at Óli Johannesen og Pól Thorsteinsson ikki vera á liðnum ímóti Íslandi, tí teir eru leikbannaðir. Óli Johannesen kom til Føroya í gjár. Hann verður á beinkinum í kvøld. Um hann kemur inn, so verður tað fyri at verða fagnaður fyri sum fyrsti føroyski spælarin nakrantíð at hava spælt 60 altjóða skrásettar landsdystir.

Eftir 3–2 sigurin á Kasakstan á Svangaskarði fingu seks spælarar boð um, at teir ikki vóru partur av hópinum undan seinna dystinum. Teir vóru Heðin á Lakjuni, sum spældi allan dystin á tamb, og sum í sínum 10. landsdysti skoraði fyrsta landsliðsmálið – til 3–0 stutt eftir steðgin – Jóhannis Joensen, sum var elsti útispælari í føroysku leguni sunnudagin, og sum spældi 1. hálvleik, og so tríggir spælarar, sum í 2. hálvleiki sunnudagin vóru á landsliðnum fyri fyrstu ferð. Atli Danielsen, Jónhard Frederiksberg og Símun Samuelsen, sum er fyrsti føroyski landsliðsspælarin yngri enn átjan ár, fingu at vita, at teir fáa ikki møguleikan í kvøld at tvífalda talið á landsdystum. Bjarni Johansen var einasti spælarin á beinkinum allar 90 minuttirnar. Hann verður ikki við í kvøld, tí nú er Jákup Mikkelsen tøkur.

– Eg skilji væl, um t. d. Jóhannis Joensen og Heðin á Lakjuni eru vónbrotnir av, at teir hesa ferð lupu av. Men teir eru framvegis inni í myndini.

Men tit hava framvegis Allan Joensen og Jan Inga Petersen á liðnum?

– Henrik Larsen hevur ongantíð havt Allan Joensen undir hond. Tí er hann framvegis á liðnum. Vit vilja fegnir undirstrika, at hetta hevur einki at gera við, um t. d. Jóhannis og Heðin í løtuni standa aftan fyri t. d. Allan Joensen, sigur Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjari á landsliðnum, og hann leggur afturat:

– Jan Ingi stóð seg avbera væl sunnudagin, og hann hevur víst, at hann er góður møguleiki. Tað ræður um at geva honum støðugar royndir.

## Ingi fær møguleikan

Henrik Larsen brúkti sunnudagin Fróða Benjaminsen á miðvøllinum í 1. hálvleiki og Julian Johnsson í 2. hálvleiki. Ætlanin er, at teir báðir eisini í kvøld skulu spæla hvønn sín hálvleik.

Tað er greitt, at Ingi Højsted verður við frá fyrsta bríksli, og tað kann hugsast, at Julian Johnsson verður makkari hjá honum. Fróði Benjaminsen og Jan Ingi Petersen vístu í 1. hálvleiki sunnudagin, at teir rigga væl saman. Eftir dystin í kvøld verður betri grundarlag at meta, hvørjir tveir av hesum fýra skulu vera á sentrala miðvøllinum ímóti Íslandi.

Ingi kom til Føroya á middegi sunnudagin, og hann sá komandi liðfelagarnar vinna 3–2 á Kasakstan.

Sum vit søgdu í blaðnum leygardagin, so verður Ingi Højsted í kvøld yngsti føroyski landsliðsspælarin nakrantíð. Sìmun Samuelsen fekk henda heiðurin, tá ið hann síðsta hálva tíman sunnudagin loysti Jákup á Borg av. Men metið verður bara standandi í tveir dagar.

Leygardagin var Ingi Højsted á U–17 liðnum hjá Arsenal. Teir vunnu 7–1 á Wolverhampton, og harvið tryggjaðu teir sær rættin at halda fram í kappingini um meistaraskapin fyri henda árgangin.

– Treytin hjá okkum var, at vit skuldu vinna í minsta lagið 4–0, og tað gjørdu vit væl og virðiliga. Spell at 1. lið hjá okkum ikki stóð seg betri enn 2–2 ímóti Bolton, staðfesti Ingi Højsted á Svangaskarði sunnudagin. Tá ið hann frætti, at Manchester United hevði vunnið 2–0 á Tottenham, helt hann tað verða torført hjá hansara felag at endurvinna meistaraheitið.

Venur tú saman við Bergkamp, Henry, Ljungberg, Vieira, Seamann og øllum hinum stjørnunum?

– Vit venja í sama øki, men vit venja ikki saman. Okkara árgangur venur fyri seg. Viðhvørt venja vit saman við eykamonnunum á besta liðnum. Eitt nú hevur Ray Parlour onkra ferðina vant saman við okkum. Men stjørnuspælunum havi eg ikki enn vant saman við, sigur Ingi Højsted, sum er sáttmálabundin at Arsenal inntil á sumri í 2005.

Roknar tú við at spæla á landsliðnum týskvøldið?

– Síðani fyri jól havi eg ikki verið plágaður av skaðum, og tað hevur gingið væl. Eg var við landsliðnum í Spania, og eg eri glaður um, at tað aftur nú vóru boð eftir mær. Eg rokni við at vera á beinkinum, og tá ið eg eri komin heim, vóni eg, at fáa nakrar minuttir á vøllinum, sigur Ingi Højsted. Hetta var frammanundan, at tað var okkum greitt, at hann verður við frá fyrsta bríksli í kvøld.

## Liðið

Leygardagin søgdu vit, at Jón Rói Jacobsen ikki skuldi koma til Føroya fyrrenn sunnudagin. Hetta varð broytt, eftir at vit vórðu kunnaðir. Michael Laudrup var samdur við Henrik Larsen í, at fyri Jón Róa og harvið bæði Brøndby og landsliðið var tað betri, at hann kom til Føroya og spældi tveir landsdystir, heldur enn at hann sat á beinkinum hjá Brøndby sunnudagin og kanska spældi nakrar fáar minuttir. Tí var Jón Rói Jacobsen í miðverjuni sunnudagin. At hann í 2. hálvleiki fór av vøllinum komst av, at hann aftur skuldi spæla í kvøld.

Jón Rói var ikki heilt væl fyri sunnudagin. Undir venjing leygardagin beklaði hann. Tí var hann ivasamur sunnudagin, men undir upphitingini varð gjørt av, at hann skuldi vera við frá fyrsta bríksli.

Í gjár komu Jákup Mikkelsen, Óli Johannesen og Christian Høgni Jacobsen til Føroya. Út frá dystinum sunnudagin, hvørjir spælarar vóru tøkir tá, og hvørjir eru tøkir nú, so kann roknast við, at liðið í kvøld fer at síggja soleiðis út: Jákup Mikkelsen – Christian Høgni Jacobsen, Jón Rói Jacobsen, Hans Fróði Hansen, Súni Olsen – Jákup á Borg, Ingi Højsted, Julian Johnsson, Rógvi Jacobsen – John Petersen, Andrew av Fløtum.

Á beinkinum fara at sita Jens Martin Knudsen, Óli Johannesen, Pól Thorsteinsson, Allan Joensen, Jan Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen og Hjalgrím Elttør.

Einasti spælari, sum ikki hevur verið í myndini ímóti Kasakstan, og sum møguliga verður við ímóti Íslandi, er Jens Kristian Hansen. Hann hevur verið skaddur, men í síðstu viku fór hann aftur at venja.



FM 2003:

# Stórmeistarin fekk harða viðferð frá føroyingum

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Finska legendan, 58 ára gamli GM Heikki Westerinen, fekk fyrstu fimm umførini í FM 2003 Atlantic Airways Cup á páskum, av at vita frá føroyingum. Tá hevði hann longu tapt á trimum føroyingum; Eyðuni Nolsøe, Hans Kristiani Simonsen og Ólavi Simonsen, sum allir hegnisliga høvdu vunnið á legenduni. Eg sjálvur og Finnbjørn Vang leiktu javnleik ímóti honum í ávíkavist øðrum og fjórða umfari.

Westerinen hevur fyrr leikt í kapping í Føroyum. Nevnliga í stórsligu VISA-kappingini í Norðurlandahúsinum í 1997, har hann somuleiðis hevði trupulleikar við føroyskari mótstøðu. John Arni Nilssen vann tá eitt spennandi talv ímóti honum.

Stutt um Westerinen kann nevnast, at hann heili átjan ferðir hevur umboðað Finnland í Talvolympiadu. Hetta var í árunum 1962-1996 (!). Umframt, at hann hevur verið yrkistelvari burturav í útvið seinastu 40 árini, er hann útbúgvin støddfrøðingur á Lærda Háskúlanum í Helsinki.

## Viknaður - men eldhugaður

Finnin er síðani seinastu vitjan í Føroyum eldur seks ár, og tað byrjar, tíverri, at síggjast á telving hansara. Hann er meira nervøsur enn t.d í 1997, sær ikki leikrøðir, sum hann fyrr uttan at blunkað hevði sæð og leikt, og eisini er rating hansara í stórari ferð farin skeiva vegin og er nú áljóðandi á umleið 2350, eftir hesi páskir.

Men hugur hansara til talvítróttin er framvegis øgiligur, og er tað hugtakandi at síggja hvussu nógvar kappingar hann á hvørjum ári leikar. Sera áhugavert er at analysera saman við honum eftir lokið talv. Er fryntligur, hevur ómetaliga gott tol, serliga tá endatalv umræður, og dámar honum eisini væl at fylgja øðrum talvum og analysera tað saman við teimum, ið telvað hava talvið.

Hann fylgdi dúgliga við FM-umdystinum millum Martin Poulsen (sum vit í seinastu viku frætti varð kosin føroyameistari), Ólavur Simonsen og Flóvin Tór Næs, á fyrstu rekkju. Sat pinnastillur við sinum egnu tonkum, og tað sást at hann við góðum huga, fylgdi við hvør bleiv føroyameistari anno 2003.

Tað sást tó ikki á Westerinen, at kapping hansara ikki varð av teimum bestu. Kanska var hann av góðum orsøkum fegin um, at hann hóast alt náddi 50% skoru, tá hugsað verður um ótespiligu fyrstu fimm umførini hansara.

Finski stórmeistarin reisti seg í miðari kapping, og tapti einki talv hareftir. Leikti tríggir javnleikir ímóti útlendingum, eitt nú ímóti kappingarvinnaranum IM Pilgaard, og vann harumframt á trimum føroyingum; Torbjørn Thomsen, Flóvin Tór Næs og Jóan Hendrik Andreasen. Ein góð uppreisn hjá Westerinen ímóti føroysku mótstøðuni.

## Tríggjar perlur

Teir fyrrnevndu føroyingar, sum vunnu á Westerinen, niðurspældi í roynd og veru finnlendingin. Ímóti Eyðun fekk hann als ikki reist seg eftir framfýsna og góða álopsspæl Eyðunsar, og stóð hann til tap longu eftir eini 15 leikir. Nærum sama søgan varð ímóti Ólavi, meðan Hans Kristian vann eitt positionelt flott talv, har finnin somuleiðis ongantíð hevði góða støðu. Talvið millum GM Westerinen og Ólav er við í blaðnum í dag.

## Talvið hesa vikuna

**GM Heikki Westerinen (2360) - Ólavur Simonsen (2223)**
FM 2003 Atlantic Airways Cup (5. umfar), 15.04.2003

**1.e4 e5 2.f4 Ric6** (Nógvir eru hættirnir at svara kongagambittinum. T.d er tað skarpa at taka ímóti finnuoffrinum, men útviklingsleikur Ólavurs sær sunnur út) **3.Bc4 Bc5 4.Rif3 d6 5.c3 Bg4** (Eyðkennistelving frá Ólavur. Sum skjótast skulu fólkini útviklast, soleiðis at møguleikar eru fyri at offra seg til sigurs!) **6.h3 Bxf3 7.Fxf3 Rif6 8.d3 0—0 9.f5 d5!? 10.Bb3?** (Bxd5 var helst besti leikur) **10...dxe4 11.dxe4 Fe7 12.Bg5 Ria5 13.Bc2 Ric4 14.b3 Rid6 15.Rid2 b5! 16.Rif1 b4 17.c4 Rfd8** (Ólavur hevur loyst allar byrjanartrupulleikar, og stendur enntá eitt vet betur) **18.Rie3 Bxe3 19.Bxe3**



**Støðan eftir 19.Bxe3**

**Rifxe4!** (Finnski stórmeistarin hevur ivaleyst yvirsæð henda leik. Verður riddarin tikin, hevur Ólavur Fh4+ í skjáttuni, so at hann vinnur mista mann aftur) **20.c5 Fh4+ 21.g3** (Bf2 er eitt betur alternativ) **21...Rixg3 22.Rg1 Ridxf5! 23.Bf2 Ff4** (Soleiðis. Svartur, umframt at hava tvær finnur í yvirskoti, stendur væl betur!) **24.Fxf4 exf4 25.Bxf5 Rixf5 26.Rg4 Rid4 27.Rc1 Rif3+! 28.Ke2 Rie5 29.Rgg1** (Finnan var eitrað vegna Rid3-gaffilin **29...Rd5 30.Rgd1 Rad8 31.Rxd5 Rxd5 32.c6 Rd6** (Støðan er fullkomiliga vunnin hjá svørtum, men finnin treiskast eitt sindur aftrat) **33.Bxa7 Rixc6 34.Bc5 Re6+ 35.Kd3 f5 36.Kc4 Rie5+ 37.Kd5 Rid3! 38.Kxe6 Rixc1 39.Kxf5 Rid3 40.Bg1 f3 41.Ke6 f2 42.Bxf2 Rixf2 43.Kd5 Rixh3 44.Kc5 g5 0—1**

# FM í dart

**Vikuskiftið undan páskum endaði kappingarárið í dart sum vanligt við FM-kappingini fyri einstaklingar**

DART
*tíðindaskriv*



*Teir tríggir fremstu í einstaklingakappingini. Petur Grønagarð í miðjuni vann kappingina, meðan Alvin Egholm og Jan Midjord*

Leygardagin varð kappast í einmansleiki. Bert 24 teir ovastu á styrkilistanum sleppa við til FM í einmansleiki, men fleiri avboð gjørdu, at nakrir leikarar longri niðri á listanum sluppu upp i part.

Fleiri av teimum hægst styrkismettu leikarunum livdu als ikki upp til styrkismetingina í bólkaspælinum, og eitt nú mátti Oddfinn Hansen (styrkismettur nr. 5) lúta fyri Jens Peturi Poulsen longu í 1/8-partsfinaluni, meðan Flemming Hansen (styrkismettur nr. 3) tapti móti Remy G. Hansen í 1/4-finaluni.

Petur Grønagarð hevði næstan verið einaráðandi í einmansleiki alt árið og hann spældi eisini sera væl hendan dagin og kom í finaluna uttan trupulleikar. Í hálvfinaluni vann Petur heili 5-0 móti Jan Midjord.

Í hinari hálvfinaluni hittust Alvin Egholm og Remy G. Hansen. Á pappírinum ein spennandi dystur. Tað sást tó skjótt, at Alvin helst kom at draga longra stráðið. Hann spældi sera væl hendan dystin, var stabilur og tryggur, tá møguleiki var at lukka settini. Alvin vann 5-2.

Finalan gjørdist ikki tað heilt stóra upplivilsi, hóast dysturin stóð millum teir báðar hægst styrkismettu leikararnar, Alvin Egholm og Petur Grønagarð. Tað sá út til, at Alvin hevði brúkt alt krútið í hálvfinaluni og Petur vann tí uppiborið finaluna 6-3 og endurvann harvið FM-heitið.

## Tvímansleikur

Sunnudagin varð so kappast í tvímansleiki. Her var frí tilmelding, men bert 11 pør luttóku. Fýra tey ovast styrkismettu pørini spældu seg uttan stórvegis trupulleikar fram til hálvfinalurnar. Tó vóru Alvin Egholm & Flemming Hansen úti í einum hørðum dysti í 1/4-finaluni, móti Gunnari Mouritsen & Jógvani Joensen.

Í hálvfinalunum vóru á pappírinum fýra rættuliga jøvn pør. Tó vóru Remy G. Hansen & Páll Dam kanska "outsidearar" móti Alvin Egholm & Flemmingi Hansen, eftirsum hetta var fyrsta kappingin hjá Pálli hetta kappingarárið. Men í fleiri settum var tað júst Páll, sum skarðarði framúr, og tað endaði við, at Remy & Páll vunnu hálvfinaluna 5-2.

Í hinari hálvfinaluni spældu Petur Grønagarð & Henning Thomsen móti Jens Peturi Poulsen & Poul Poulsen. Hetta gjørdist ein sannur gysari, og tá komið var til 9. og avgerandi settið, hingu nervarnir uttaná hjá øllum fýra leikarunum. Allir fýra høvdu møguleikan at avgerða dystin, men tað blivu Petur & Henning, sum tryggjaðu sær plássið í enn einari FM-finalu.

Finalan var alt annað enn væl leikt (møguliga vóru nervar orsøkin). Men spenningurin treit ikki. Øll 11 settini máttu spælast fyri at finna ein vinnara, og tá avtornaði høvdu Petur & Henning vunnið 6-5. Hetta var teirra triðja FM-heiti í tvímansleiki seinastu 4 árini.